# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroysk matgerðarlist

Føroyingar hava ikki altíð gjørt nógv burtur úr mati og matgerð. Gerandisdagurin var strævin, og tað ráddi um hjá teimum flestu at fáa mettuna og lítið yvirskot mundi vera til tær stóru kulinarisku venjingarnar.

Hinvegin eru fornir matsiðir áhugaverdir og partar av okkara siðsøgu. Fornu matsiðirnir vóru mest knýttir at tí, sum fekst úr sjónum, úr bø og haga. Men við samfelagsbroytingunum komu eisini stórar broytingar í matvanar føroyinga. Fólkatalið vaks, og fjøldin av ognarleysum vaks samsvarandi, ognarleysir kundu fáa traðir, so tú kundi nøkta tann mest grundleggjandi tørvin við eplum og mjólk. Tvøst og spik, seiður og vanligur útróðrarfiskur vóru álitið, men mangan stóð á at fáa mettuna, tá uppiløgur ella fiskaloysi vóru. Eisini grindaárini vóru ymisk, so tað er væl skiljandi, at kanska sjálv matgerðarlistin ikki var tað, sum lá fólkinum fremst í huga.

Hinvegin vóru fólk, serstakliga framskygdar kvinnur, sum royndu at varðveita og menna gamlar føroyskar matsiðir. Hesar undangongukvinnur royndu mangan við góðum úrslitum at breiða út kunnleika til fornar og siðbundnar matsiðir.

Við nýggjum tíðum koma nýggir siðir. Ein týðandi táttur í altjóðagerðini er áhugin fyri lívsstíli og í hesum sambandi ikki minst áhugin fyri matlistini. Hetta er eitt eyðkenni fyri ríka og framkomna heimin, sum vit eru partur av, og hetta er eitt eyðkenni fyri samfeløg við stórum búskaparligum og mentalum yvirskoti. Áhugin fyri mati og matgerð hevur sjálvsagt eisini nakað at gera við allar tær lívstílsjúkur, ið herja framkomna heimin. Meðan milliónir í tilafturskonum londum ikki hava nóg mikið til matna, stríðast milliónir í framkomna heiminum við fylgjurnar av skeivum og heilsuvánaligum mati.

Matmentanin í framkomna heiminum er í stóran mun eyðkend av ósunnum og fitandi skundmati, og gongur hetta serstakliga út yvir børn og ung, ið, sum tilkomin, fáa álvarsamar lívsstílsjúkur at dragast við. Tað er tí at fegnast um, at alt fleiri um okkara leiðir royna at bøta um okkara kostvanar. Tað er bæði gott og gagnligt, at fólk og fyritøkur seta fokus á dygdargóðan og heilsugóðan kost úr okkara náttúrutilfeingi Matfestivalurin, sum var herfyri, avdúkaði teir stóru møguleikar, sum Føroya náttúra goymir, tá vit hugsa um matgerðarlist. Tað er ikki ov nógv sagt, at fólk eru mestsum paff av teimum mongu og spennandi møguleikum, sum vit hava her í Føroyum at menna matgerðarlistina. Vit hava fingið eyga á nýggjar møguleikar, tað veri seg í tí ríkidømi, sum havið goymir eins væl og møguleikunum á landi. Skeljar, fiskur, tari, plantur og seyður – eitt ómetaligt ríkidømi við møguleikum fyri fjølbroyttari og heilsugóðari matgerðarlist. Her eru stórir menningarmøguleikar við atliti at fólkaheilsu og ferðafólkaídnaði.

Tey, sum royna at menna hetta økið, hava uppiborið bæði tøkk og stuðul. Hesi fólk hava fingið okkum at síggja nakrar møguleikar, sum flestu okkara lítið og einki vistu um, men sum kunnu verða okkum at gagni, um vit læra at troyta teir. Matfestivalurin er eitt gott tiltak, sum vónandi verður afturvendandi.

**Sosialurin**

## Kanónirnar venda skeivan veg, Hans Pauli

BJØRN KALSØ



Frákoyrdi landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm, leggur nú púra ógrundað eftir Sambandsflokkinum fyri førda politikkin á pensiónsøkinum. Maðurin má vera vorðin í ørviti av vánaligu veljarakanningini hjá Javnaðinum, tí hann veit væl, at tað er floksformaður hansara, Jóannes Eidesgaard, og harvið Javnaðarflokkurin, sum í Ólavsøkupakkanum hevur skotið upp sparingar á pensiónsøkinum á 25 mió. kr. við at mótrokna frá fyrst tjentu krónu og við at hækka pensiónsaldurin.

**Átti heldur at skotið eftir sínum egnu og loysingarveinginum**

Tá Hans Pauli Strøm sat sum landsstýrismaður í fyrru ABC, sat Sambandsflokkurin á pengakassanum. Tá hendu fleiri batar á pensiónsøkinum. Men nú Javnaðarflokkurin situr á kassanum, regnar inn við uppskotum um sparingar á sama øki, samstundis sum javnaðarmenn ræðast síni egnu uppskot so illa, at teir kappast um at heingja tey um hálsin á øðrum.

Nei, Javnaðarflokkurin vil heldur nýta peningin til m.a. dýr luksus prestigeprojekt og eitt upppumpað Uttanríkisráð, heldur enn at veita teimum veiku í samfelagnum batar. "Klassastríðið er jú av" sambært Javnaðarflokkinum.

Tað skal tó sigast, at vit í Sambandsflokkinum, tá seinna ABC varð skipað, við tógvið stríð fingu Javnaðarflokkin frá ætlanunum, teir høvdu í CHE, um í 2010 at lække blokkin við 117 mió. kr., umframt at taka yvir figgjareftirlitið, sum hevði tikið alt trygdarnetið undan peningakervi okkara. Vit kunnu bara ímynda okkum standin, um hetta varð gjørt við at líta til grannar okkara fyri vestan.

**Tøkkin oftast gráin**

Gud viti hvar Javnaðarflokkurin hevði staðið í veljarakanningunum um teir saman við øllum hinum loysingarflokkunum høvdu sloppið at gjørt tað teir ætlaðu í CHE ?

Nei, Hans Pauli! Kanónirnar venda skeivan veg. Tú átti at takkað Sambandsflokkinum fyri samstarvið, tá tú sat í landsstýrinum og fyri at hava bjargað tykkum í Javnaðarflokkinum og landinum sum heild frá undirgangi, tá seinna ABC varð stovnað.

Men sum orðatakið so rætt sigur: "*Tøkkin er oftast gráin*". Grein tín "*Javnaðarflokkurin hevur altíð verið trygdin fyri pensiónini*" er besta dømi.

**Sigur ósatt**

Tað er ikki rætt, tá Hans Pauli í greinini fær tað at ljóða, sum um pensiónirnar eru lækkaðar síðan Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, tók við. Viðbótirnar til pensiónina eru hinvegin hækkaðar við javningini á 3%.

## Besta og fjónaða tunnilsloysnin

JÓNLEIF JOHANNESEN
Klaksvík



Tað finst ein loysn til Sandoyartunnilin, sum ikki pínir heilsuverkið, almennaverkið, skúlaverkið ella onnur týðandi økir. Loysnin er als ikki partur av skattakrónum okkara og verður best framd í krepputíðum.

**Loysnin er hendan**

Vit knýta Norðoya, Vága, Norðskála og Kollfjarða tunlarnar saman í eina skipan. Skipanin skal virka á tann hátt, at bilurin bert verður skrásettur einaferð um dagin. T.v.s. at tað kostar tað sama at koyra gjøgnum allar tunlarnar, sum tað kostar at koyra gjøgnum ein.

Síðani verða hesir tunlar samlaðir í eitt partafelag saman við Sandoyartunnlinum.

Við útgangsstøði í prísi og bilatali fyri Vága og Norðoyartunlunum, er ein veruleikakend meting, at nýggja partafelagið uttan trupulleikar kann hava eina inntøku á 100 milliónur krónur hvørt ár. 40 milliónur fara til Vága og Norðoyartunlarnar. Hinar 60 milliónurnar fara í fyrstu atløgu til Sandoyartunnilin.

Tað er eingin trupulleiki at læna 700 milliónur við slíkum inntøkugrundarlagi.

Byrjað verður uppá Sandoyartunnilin í 2011.

Vit eiga ikki at gloyma styrkjuna, sum liggur í einum felagstaki øllum landinum at frama.

Vónandi verður hendan loysnin ein partur av viðgerðini av Sandoyartunnilinum, sum verður í næstum.

## Føroyskt alfabet og teleonbókin

ALMA BJARTALÍÐ
Klaksvík



Tað er gott, at vit nú fáa eitt ment tjak um føroyska alfabetið. Um Løgtingið skal avgera endaliga úrslitið, er kanska ivasamt - men lat nú tjakið koma í gongd av álvara.

**Telefonbókin**

Viðhvørt er torført at finna nøvn í telefonbókini, t.d. nøvn, sum byrja við serføroysku bókstøvunum.

Gott eigi tykkum, sum leggja bókina til rættis:

*Prentið alfabetið, sum tit brúka, á sjálva permuna uttan.*

*Og við hampuliga stórum støvum eisini.*

Tað ber uttan iva til at seta tað dekorativt og klárt upp.

Hava tit sæð ensk/føroysku orðabøkurnar hjá Sprotanum? So klárt og skilliga sett upp! Leitiorð í bláum liti, - ja, tað er eitt spæl at finna vegin fram. Eg kundi ynskt, at Føroya Tele vildi spandera eina telefonbók nakað í tann stíl næstu ferð! Livst so spyrst.

Annars skulu tit hava rós fyri permurnar á bæði 2008 og 2009 telefonbókunum. Klárt og greitt í svørt/hvítum, (hevði tó verið 'vinarligari,' um tað stóð á ljósum litaðum pappíri).

Við tøkk fyri upptøkuna.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.